# TÍÐINDI

SAMBAND
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
tlf 341800

*– Vit hava kvotu at halda okkum til, tá hon er fiskað, noyðast vit at gevast. Eg stúri fyri, at »ránsskipini« gera enda á kongafiskiskapinum.*

*Sonny Johannesen, skipari, 9. mai '06*

# Flagg- og navnleysur trolari í Smoguni



*Navn og flaggleysi trolarin, sum norska sjóverjan tók í nátt.*

**Norska sjóverjan tók í nátt ein trolara, sum fiskaði í Smoguni, og sum hvørki hevði navn, heimstaðarnavn, nummar ella flagg.**

FISKIVEIÐI
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Norska sjóverjan hevur hildið eyga við trolaranum teir seinastu dagarnar, men tá skiparin í gjárkvøldið sýtti fyri at svara sjóverjuskipinum og at gera eftir boðum teirra, var tolið hjá sjóverjuni uppi.

Tá skiparin klokkan trý í nátt sýtti fyri at taka trolið inn, gjørdi sjóverjan av at kvetta veirarnar, og síðani vórðu menn hjá sjóverjuni settir umborð á skipið, nakrir við báti og nakrir við tyrlu. Teir tóku so ræðið umborð og settu kós ímóti Tromsø, hagar trolarin ætlandi kemur í morginári.

Kunningarráðgevin hjá norsku sjóverjuni sigur við Aftenposten, at skiparin á tí flagg- og navnleysa trolaranum hevði fingið at vita frá reiðarínum, at hann skuldi ikki samstarva við sjóverjuna.

Hóast trolarin hvørki hevur navn, heimstaðarnavn ella flagg, vita norsku myndugleikarnir, at talan er um eitt skip, sum eitur »Joana«, og fyri sjúrtan døgum síðani upplýsti skiparin, at skipið hevur heimstað í Sao Tome í Vesturafrika. Men skjøl, sum eru funnin umborð, vísa, at skipið skifti navn og flaggstað fyri einari viku síðani.

Talsmaðurin hjá norsku sjóverjuni sigur, at trolarin hevur fyrr itið »Lootus«, og hann hevur millum annað verið skrásettur í Estlandi. Hann hevur roynt víða, men er rikin burtur allastaðni og endaði nú í Smoguni. Men tað gekk so heldur ikki.




Nú er stundin, har vit sjálvi fara at uppliva tað, ið vit javnan hoyra ovfarin ferðafólk greiða okkum frá um Føroyar. Her er gott at ganga, spennandi at sigla og stórbært at súkkla. Her er nakað fyri alla familjuna. Og í summar eru enn fleiri tiltøk og ørandi avbjóðingar, ið bara bíða eftir tær. Spyr bara kunningarstovurnar. Tær vita og hava nógv tilfar um Føroyar av geva tær.

**Halt frí tá tú hevur frí. Ferðast í Føroyum - TAÐ er lívið...**

www.visit-faroeislands.com